

# ExxonMobil rýmir úr Grønlandi

**Jan Müller**

14.12.2013 - 18:23

Oljan.fo

**Heimsins største oljufelag, ExxonMobil, sum telist millum feløgini, ið fara at bora á føroyska landgrunninum næsta ár, ætlar at rýma úr Grønlandi. Hetta veit heimasíðan EnergyWatch at siga. Ein orsøk til at felagið ætlar at taka seg aftur úr Grønlandi eru stóru og nýggju møguleikarnir kring heimin at útvinna skifurgass.**

Berlingske Business skrivar, at amerikanska felagið fer ikki at bjóða uppá nýggj leitiloyvi í Grønlandi. Felagið hevur longu tikið seg úr einum loyvi og fer nú úr enn einum loyvi. Felagið letur bæði loyvini aftur til grønlendskar myndugleikar.

Oljufelagið grundgevur hetta við stóru útreiðslunum, sum eru knýttar at oljuleiting í Arktis umframt stóru møguleikarnar fyri einki at fáa burtur úr og entá umhvørvisvanlukkur skrivar blaðið.

Keldur siga við blaðið, at ExxonMobil í staðin fer at leggja seg eftir leiting og framleiðslu á amerikanska marknaðinum í sambandi við náturgass, eitt nú skifurgass.

Grønlendskir myndugleikar dylja ikki fyri, at tað er bæði dýrt og trupult at leita eftir olju í ísfarvatni í Grønlandi. Myndugleikarnir rokna við, at oljufeløgini neyvan eru klár til at royndarbora fyrr enn um eini 10 ár.

Grønlendskir myndugleikar leggja eisini sera stóran dent á trygdina í sambandi við boring. Ein fullfíggjað boriskrá við seismiskum kanningum og einum til tveimum brunnum yvir eitt tíðarskeið uppa 16 ár fer at kosta 500 milliónir dollarar fyri hvørt loyvi, sigur stjórin í Ráevnisstýrinum í Grønlandi, Jørgen T. Hammeken-Holm við danska blaðið.